# Nýggi Smyril doypast næsta leygardag

**Leygardagin 24. september, verður nýggi Smyril doyptur í Spania. Eftir ætlan kemur hann til Føroya fyrst í oktober og verður settur í sigling umleið hálvan oktober**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nýggi Smyril verður doyptur leygardagin 24. september.

Tað er greitt nú og innbjóðingar eru nú í ferð við at verða sendar teimum, sum skulu við.

Tað verða nøkur fá umboð fyri Strandferðsluna og landsstýrið, sum verða við í hátíðarhaldinum, umframt politikarar úr Suðuroy.

Tað verður Anita Eidesgaard, løgmansfrúa, sum fær heiðurin at doypa nýggja flaggskipið í strandferðsluflotanum.

Spurningurin er so, nær skipið kemur til Føroya.

Og tað er ikki heilt avgreitt enn.

Tað er í øllum førum greitt, at nýggi Smyril verður ikki handaður 22. september, soleiðis sum tað annars hevur ligið í kortunum seinastu tíðina.

Spanska skipasmiðjan hevur bundið seg til at koma við eini vegleiðandi dagfesting ein mánaða áðrenn hon er til reiðar at avhenda skipið.



*Vit kunnu vænta, at nýggi Smyril verður settur í sigling umleið hálvan oktober. Men vit kunnu eisini vænta, at partar av honum verða stongdir, tá ið lítið ferðafólk er við, men tað má undir ongum umstøðum avmarka møguleikarnar at ferðast, sigur stjórin. Hinvegin eru ongar ætlanir um at seta ferðina niður fyri at spara olju*

Men tann nágreiniligi dagurin fyri, nær skipið skal latast, skal verða ásettur minst eina viku frammanundan.

Tá ið hann var royndartúr fyri kortum, vóru onkrar rættingar og stillingar at gera í teimum ymsu skipanunum umborð og tað er nú gjørt.

– Men sunnudagin, skal hann ein royndartúr afturat fyri at staðfesta, at alt riggar sum tað skal.

Og tað, sum nú liggur í kortunum, er, at nýggi Smyril verður latin føroyingum hósdagin 29. september.

– Tað haldi eg er eitt heilt gott boð, tí fyri hvønn dag, sum gongur, verða ivamálini færri og færri.

Kristian Davidsen sigur, at tað fer at taka einar fimm dagar at sigla hann heim. Í Føroyum skal hann vísast fram fyri almenninginum og síðani fer tað at taka eina viku at gera skip og manning klárt til at fara undir fasta sigling ímillum Suðuroy og Havnina.

Sostatt væntar hann, at nýggi Smyril verður settur í sigling umleið hálvan oktober.

### 18-22 fólk

Stjórin á Strandferðsluni sigur, at tað fara at sigla ímillum 18 og 22 fólk við nýggja Smyrli.

– Við eini manning uppá 22 fólk, kann Smyril sigla við fullum ferðafólkatali, sum er næstan 1000 ferðafólk.

Men vanliga eru nógv færri fólk við og tí er heilt trúligt, at ein partur av skipinum verður læstur fyri at kunna lækka manningartalið, tá ið færri fólk eru við.

– Trygdin umborð krevur, at manningartalið lækkar, skal ein partur av skipinum verða stongdur fyri ferðafólki, tí annars kann tað verða trupult at fáa alt fólkið av skipinum í eini neyðstøðu.

Kristian Davidsen sigur, at tað er trúligt, at hetta verður mannagongdin.

– Hinvegin vita vit, at tað eru ávísir dagar og ávísar tíðir, at tað er nógv fólk við og tað má ikki henda, at manningin verður skerd so nógv, at tað á nakran hátt fer at følast sum um at møguleikarnir at ferðast verða avmarkaðir.

Eitt nú væntar stjórin nógv ferðafólk tað fyrstu tíðina og tá verður í hvussu so er full manning við.

Eitt annað er, hvussu skjótt skipið fer at sigla.

Nýggi Smyril er smíðaður til at sigla 21 míl í vanligari sigling. Tað ger, at Smyril kann sigla ímillum Suðuroy og Havnina upp á 1 tíma og 35-40 minuttir. Kann tað væntast at ferðin verður lækkað fyri at spara olju?

– Vit hava lagt okkara fíggjarætlan eftir tí, at nýggi Smyril skal halda ætlaðu ferðina upp á 21 míl. Men tað er rætt, at verður ferðin sett niður, er peningur at spara í oljunýtsluni, sigur Kristian Davidsen.

Og tað er ikki so heilt lítið heldur, leggur hann afturat.

– Verður ferðin slækka bara eitt míl, niður í 20 míl, vísa útrokningar, at vit spara eini 20% í olju. Tað svarar til einar fýra milliónir um árið við teimum oljuprísum, sum nú eru. Men har skal leggjast afturat, at tá ið hann var royndartúr, bar ikki til at staðfesta so stóran mun í oljunýtsluni, so tað mugu neyvari mátingar til fyri at fáa greiði á, hvussu stór sparingin er í veruleikanum, sigur Kristian Davidsen.

– Men at seta ferðina niður fyri at spara olju, er ikki ein møguleiki, sum vit hava arbeitt við í sambandi við okkara fíggjarætlan fyri 2006, endurtekur hann. Har hava vit gingið útfrá, at hann skal sigla 21 míl, sum ætlað.

# Nú er aftur arbeiði á flakavirkinum í Hvalba

**Nú er dagurin komin, sum hvalbingar hava longst eftir leingi og teir hava góðar vónir til at tað fer at bera til**

FISKAVIRKIÐ Í HVALBA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er aftur arbeiði á flakavirkinum í Hvalba!

Eftir at hava ligið stilt tað mesta av einum ári, er eitt nýtt felag stovnað, sum hevur latið virkið í Hvalba uppaftur.

Fyrsti arbeiðsdagur var mánadagin, men hesar dagarnar hava tey brúkt til at fáa gongd á framleiðsluna.

Tað eru Delta-menninir á Tvøroyri, sum eru høvuðsmenn í nýggja flakavirkinum í Hvalba og teir hava sostatt lagt enn ein stein afturat teirra virksemi.



*– Arbeiðið verður helst til eini 25-30 fólk á flakavirkinum í Hvalba, nú tað er latið uppaftur. Vónirnar til at tað fer at bera seg hesuferð, eru betri enn tær hava verið leingi*

Delta- menninir hava frammanundan flakavirki á Tvøroyri og í Sandoynni.

– Teir hava í hvussu so er víst, teir duga at fáa tað at bera til og tí hava vit góðar vónir til at tað hesuferð fer at eydnast at hava virkið opið, siga hvalbingar.

Annars hava eisini hvalbingar sett pening í nýggja virkið, bæði trolararnir í Hvalba, onnur skip og arbeiðarafeløgini í Hvalba. Flakavirkið í Hvalba hevur havt eina umskiftiliga tilveru og hetta er minst fimtu ferð, at tað er endurreist.

Men vónirnar eru góðar, at tað skal bera til.

– Sjálvandi eru góðar vónir um at tað skal bera til, annars vóru vit ikki farnir undir virkið, sigur Ólavur Bjarkhamar, sum er stjóri á flakavirkinum í Hvalba.

Hann sigur, at ein avgjørt styrki í teirra virksemi verður, at flakavirkið í Hvalba og flakavirkið hjá Delta á Tvøroyri, arbeiða undir somu leiðslu.

– Tað bæði sparir fastar útreiðslur, men tað gevur eisini báðum virkini góðar møguleikar at samstarva.

Ikki minst heldur hann, at eitt samstarv um rávøru, fer at fáa stóran týdning fyri bæði virkini.

Bæði hetta og tað, at virkini hava felags leiðslu, fær kostnaðarstøðið á báðum virkjunum niður og ger tey sostatt betri kappingarfør

– At vit eru tvey virki, sum samstarva fer at geva okkum heilt aðrar møguleikar at keypa heilar lastir og at býta fiskin ímillum virkini bæði, soleiðis sum tað hóskar seg seg best.

Virkið á Tvøroyri verður nú saltfiskavirkið burturav og tí er ætlanin at lata tann stóra upsan og toskin fara hagar at verða saltað, tá ið teir keypa eina last.

– Hinvegin er virkið í Hvalba flakavirki burturav, sum fer at leggja dent á fesk fløk, við einum sindur av frystum sum ískoyti ella sum tað liggur fyri. Sostatt er ætlanin at lata kongafiskin, upsan og kanska hýsuna, hvítingin og tann smáa toskin fara til Hvalbiar.

Hesar fyrstu dagarnar hava 25 fólk verið til arbeiðis og Ólavur Bjarkhamar væntar, at talið fer at liggja um 25-30 fólk, sum heild.

Av tí at talan er um eitt feskfiskavirki, verður tað mesta arbeiðið mitt í viku, sum á øðrum feskfiskavirkjum.

– Verður tað lønandi, ætla vit at fylla út við frystum vørum, men tað verður, sum tað liggur fyri.

Hóast trolararnir í Hvalba havasett pening í virkið, hava teir á ongan hátt bundið seg til at tryggja virkinum fisk at arbeiða.

– Vit hava onga trygd fyri rávøru, so tað verður í kapping við øll onnur, sigur Ólavur Bjarkhamar.

Hann væntar at virkið í Hvalba fer at arbeiða eini 2500 tons um árið.